

## Bush varð funnin deyður av misgávum

Ein Suðurafrikansk sjónvarpsstøð skrivaði, av misgávum, at fyrrverandi forsetin í USA, George W. Bush, var deyður. Tað var í tíðindasending hjá e.tv mánadag seinnapart, at teksturin »George Bush er deyður« rullaði um sjónvarpsskíggjan. Talsmaður hjá e.tv, Vasili Vass, sigur, at mistakið hendi tá tøkningar skuldu kanna, hvussu ein bannari sá út á skerminum. Ein tøkningur trýsti tá av misgávum á sendiknøttin ístaðin fyri royndarknøttin, og orðini um Bush vóru sýnd í beinleiðis sjónvarpi. Tann villeiðandi bannarin varð skjótt tikin av skíggjanum, men støðin fer hóast alt at seta nýggjar mannagongdir í verk, tá grafikkur og bannarar skulu roynast framyvir, sigur Vasili Vass.

## Yngri skulu hava atkvøðurætt

Fólkatingið eigur at broyta lógina, so valrætturin, sum nú er 18 ár, verður lækkaður. Tað heldur í hvussu er Johannes Andersen, sum er lektari og samfelagsgranskari á lærda háskúlanum í Aalborg. Hugskotið er ikki ókent, og fleiri politikarar hava tosað um at skipa fyri royndarvali fyri at vita, um fólk, sum eru yngri enn 18, eru búgvin at taka støðu. Men tað er óneyðugt, sigur Johannes Andersen. Eftir hansara tykki er tað umráðandi at geva teimum ungu samábyrgd við at geva teimum valrætt.

# Klassa og umvæla á MEST

**Ísfiskatrolarin Edna verður klassaður, og skrúvurnar á ferðafólkaskipinum Sam skulu umvælast. Grímur Kamban, sum herfyri hevði ringan túr eystanfyri, verður væntandi klárur aftur til fiskiskap í hesi vikuni**

VINNA
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*



*Ísfiskatrolarin Edna og ferðafólkaskipið Sam á bedingini hjá skipasmiðjuni MEST í morgun*
*Mynd: Vilmund Jacobsen*

Á skipasmiðjuni MEST í Havn eru teir í holt við umvælingar og ábøtur á trý skip í løtuni.

Tveyteirra, ísfiskatrolarin Edna og ferðafólkaskipið Sam, standa uppi á bedingini, meðan ísfiskatrolarin Grímur Kamban liggur við bryggju.

Av hesum fer mest umfatandi arbeiði fram umborð á Ednu, har í fyrsta lagi høvuðsmotorur og skipið annars verða klassað.

Hjá Sam eru tað skrúvurnar, sum skulu umvælast. Skipið hevur tvær skrúvur, og sum skilst eru tær sendar niður til Grenå til umvælingar. MEST tekur sær av at taka skrúvurnar av, senda tær av landinum og seta tær í aftur, tá tær koma heimaftur.

### Skjótt klárur

Umvælingarnar umborð á Grími Kamban, sum herfyri hevði ein ringan túr eystanfyri, ganga væl.

Tá manningin mest at kalla kom í havsneyð, tí nógvur sjógvur gekk inn á verksmiðjuna, samstundis sum pumpurnar sviku, sóu teir seks menninir umborð seg noyddar at lata sjógvi fara niður í last og maskinrúm fyri at halda stabilitetinum so nøkulunda upp á pláss.

Tá avtornaði, vóru eini 40 tons av sjógvi í maskinrúminum og á leið tað sama í lastini.

Tíbetur vísti tað seg, at skaðin, sum sjógvurin hevði gjørt í maskinrúminum, ikki var so álvarsligur.

Á skipasmiðjuni MEST siga tey, at arbeiði at umvæla skipið hevur gingið væl, og gongst sum ætlað, kann skipið loysa aftur til fiskiskap í hesi vikuni.

Sum skilst, eru tað serliga el-instalatiónir í maskinrúminum og onkur elektromotorur, sum hava fingið skaða.



*Grímur Kamban, sum sæst við bryggjuna, verður væntandi klárur aftur til fiskiskap í hesi vikuni*
*Mynd: Vilmund Jacobsen*

# Vestmenningur og Fram skifta motor

**Um mánaðarskiftið mars/ apríl fara trolararnir Fram og Vestmenningur at skifta motor á skipasmiðjuni MEST í Havn**

VINNA
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Ísfiskatrolararnir Fram og Vestmenningur, sum í fjør royndust millum teir heilt stinnu í føroyskari fiskiveiðu, skulu hava nýggjar motorar.

Skipini eru smíðað á Tórshavnar Skipasmiðju ávikavist í 1988 og 1989, og tá fingu tey hvør sína M.W.M. maskinu á 1305 HK.

Tað eru somu motorar, sum hava verið í skipunum øll árini síðan, og nú heldur felagið P/F Meðalsbrekka í Vestmenna, sum eigur skipini, at tíðin er komin at skifta motor.

Á skipasmiðjuni MEST í Havn vita tey at siga, at nýggju motorarnir til skipini standa klárir, og sambært avtaluni millum partarnar, er ætlanin, at motorarnir skulu skiftast um mánaðarskiftið mars/ apríl.

Hetta er líkasum í skiftinum millum upsa og gullaks.

Á MEST siga tey, at nýggju motorarnir, sum verða settir í vestmannatrolararnar, eru av slagnum Wartsila, og teir hava somu støðd sum teir, ið eru í skipunum í dag.

Fram og Vesturbúgvin vóru í fleiri ár heimahoyrandi í Ný Sælandi, eftir at skipini vórðu seld úr Føroyum.

Tað var felagið P/F Meðalsbrekka, sum keypti skipini heimaftur til Føroya, og útgerðarmaður og høvuðseigari er Tummas Christhopersen.